# Landsverk sigur nei til Hovstunnilin

**Ætlanin var, at Landsverk skuldi yvirtaka Hovstunnilin fríggjadagin, men tað var av ongum, tí alt er ikki gjørt sum tað skal, sigur Oyvindur Brimnes**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað er framvegis ógreitt, nær Hovstunnilin kann takast í nýtslu, men tað ganga í hvussu so er nakrar vikur afturat*

Suðuroyingar noyðast at brynja seg við toli í eina tíð afturat, áðrenn teir sleppa at koyra Ígjøgnum Hovstunnilin.

At síggja til hevur tunnilin annars leingi sæð út til at vera liðugur, tí virksemið rundanum hann hevur ikki tókst serliga stórt.

Og tað skerst ikki burtur, at suðuroyingar leingi hava tråkkast eftir tí degi, har koyrandi varð ígjøgnum fjallið, heldur enn eftir smala, krókuta og vindharða fjallvegnum um Hovseggina.

Men Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sigur, at tað ganga í hvussu so er nakrar vikur afturat, áðrenn tunnilin kann takast í nýtslu.

Annars var ætlanin, at Landsverk skuldi yvirtaka tunnilin fríggjadagin, men tað var av ongum.

Tað vísir seg nevniliga, at alt arbeiðið er ikki gjørt, sum tað skal og tí vildi Landsverk ikki yvirtaka Hovstunnilin fríggjadagin sum ætlað.

- Tað er ymisk viðurskifti, sum ikki eru í lagi og tí kundu vit ikki yvirtaka tunnilin fríggjadagin, sum ætlað, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann visti ikki í smálutir, hvørji viðurskifti tað vóru, sum ikki vóru nøktandi.

Men talan er um ymiskar tekniskar installatiónir í sambandi við tunnilin, ið ikki eru, sum tær skulu.

Hann skoytir annars upp í, at onki óvanligt er í hesum, at øll viðurskifti ikki eru, sum tey skulu beinanvegin.

Hann sigur eisini, at semja er ímillum Landsverk og Ístak, sum hevur gjørt tunnilin, um tey viðurskifti, sum ikki eru, sum tey skulu og sum tað skulu bøtast um.

## Ganga nakrar vikur

Av tí at ymist er, sum ikki er gjørt sum tað skal, dugir Landsverk ikki at siga, nær alt er fingið í rættlag, so at tunnilin kann yvirtakast.

Men hann sigur, at ein fyribils meting sigur, at tað ganga minst tvær vikur.

Tað kann eisini taka longri tíð, tí ymiskt kann taka seg upp, sum ger, at tað dregur út, eitt nú leveringstíðir til ymiskt tilfar, sum skal brúkast.

Tí vil hann heldur ikki enn áseta nakran dag fyri, nær tunnilin verður klárur at taka í nýtslu.

Tað einasta, hann sigur, er, at Landsverk heldur seg enn til upprunaligu tíðarætlanina, sum sigur, at tunnilin skal vera liðugur um ársskiftið.

Hann hevur tó fyrr sagt, at alt bendir á, at tað verður nakað væl fyrrenn tað.

Men í løtuni hevur hann onki boð upp á, nær tað verður.

---

# Sera áhugaður í móta

**Jannich Hjaltalin, sum gongur í 9. flokki í Eysturskúlanum er í starvsvenjing í mótahandlinum Skálki**

STARVSVENJING
*Orð og mynd: Jákup Mohr Müller og Rannvá Tryggvadóttir*

Honum dámdi óføra væl at vera har, og hansara starvsfelagar róstu honum nógv fyri hansara stóra innsats.

Hann hevði eisini ætlanir um at fáast við móta sum eldri.

Hann hevði selt nakrar T-shirts, nakrar buksur og annað tann dagin. Og hann var heilt vísur í, at hann fór at fáast við klæðir ella eiga ein klædnahandil sum eldri.

***Sp.:** Hvat hevur tú selt í dag?*
**Sv.:** Blusur og T-shirts.

***Sp.:** Hvat hevur tú gjørt?*
**Sv.:** Staðið við kassan og sett vørur uppá pláss.

***Sp.:** Hví valdi tú hetta starvið?*
**Sv.:** Eg eri sera áhugaður í móta og klædnahandli.

***Sp.:** Hvar fert tú næstu ferð?*
**Sv.:** Til onkran designara

***Sp.:** Hvussu eru starvsfólkini?*
**Sv.:** Mega fitt

***Sp.:** Er hetta nakað tú kundi hugsað tær at gjørt í framtíðini?*
**Sv.:** Tað er 100 %.

*(Av misgáum kom skeiv mynd í fríggjadagin. Tí prenta vit greinina umaftur við røttu myndini).*



*Jannich Hjaltalin hevur fingið nógv rós fyri sítt arbeiði sum starvspraktikantur í Skálki*